Tvey umboð fyri Danmission í Føroyum:

# Byggja brýr millum átrúnaðir

*- Gjøgnum fjølmiðlarnar verða vit bombarderaði við fíggindasinnaðari fremmandagerðing, serliga millum Kristindómin og Islam, og tískil er eitt aðalendamál hjá Danmission at bróta niður fordómar og byggja brýr millum átrúnaðarligar bólkar, siga landsskrivarin og samskiftisleiðarin í Danmission, Ruth-Inge Gregersen og Torben Holm, sum her eru avmyndaði saman við Hans Jacob Joensen biskupi, sum tey hittu í Tanzania í juni 2003*



**Í seinastu viku høvdu føroyingar vitjan av landsskrivaranum og samskiftisleiðaranum í størsta danska hjálparfelagsskapinum, Danmission. Umframt at upplýsa og eggja til stuðul hava tey bæði umboðini fingið serligt tilknýti til føroysku fólkakirkjuna á einum túri í Tanzania í juni 2003. Umframt trúboðara- og hjálpararbeiði er endamál teirra at skapa frið, sátt og semju millum ymsar trúarbólkar í einum heimi eyðkendum av fíggindasinnaðari fremmandagering**

KIRKJUVIRKSEMI
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Í juni í ár varð nýggjur biskupur settur í býnum Karagwe í Tanzania, har størsti danski hjálparfelagsskapurin, Danmission, í fleiri ár hevur verið virkin. Í hesum sambandi vóru tey bæði Torben Holm (samskiftisleiðari) og Ruth-Inge Gregersen (landsskrivari) umboðandi Danmission til bispasetanina í Tanzania, og við á ferðini var eisini føroyski biskupurin, Hans Jacob Joensen. Á ferðini vórðu vinabond knýtt millum føroysku kirkjuna og stiftsstjórnina í Karagwe í Tanzania, sum Danmission nú ynskir at halda við líka.

### Vinabond millum Føroyar og Tanzania

- Vit leggja stóran dent á, at vinabond verða knýtt millum ymsar mentanir og stiftsstjórnir gjøgnum Danmission. Í sambandi við, at føroyski bispurin var við okkum í Karagwe, er samband nú knýtt millum okkum og kirkjurnar báðar í Føroyum og Tanzania, og vit vilja eggja teimum at varðveita hesi vinabond, sigur landsskrivarin í Danmission, Ruth-Inge Gregersen.

Tey bæði Ruth-Inge og Torben Holm komu at kenna Hans Jacob Joensen bisp undir ferðini í Tanzania, og búðu tey í seinastu viku hjá bispi í Føroyum. Á ferðini hava tey hildið fyrilestrar og upplýst føroyingar um møguleikarnar at stuðla Danmission. Umframt peningaligan stuðul vísa tey á høvið at fara í onnur lond við felagsskapinum í starvsvenjing undir útbúgving ella sum frívillig og ófaklærd.

- Hóast vit høvdu komið til Føroya undir øllum umstøðum at upplýsa um Danmission, ynskja vit serliga eftir túrin í Tanzania at upplýsa føroyingar um tey vinabond, sum nú eru knýtt millum kirkjurnar báðar, og á henda hátt eru ørindi okkara ikki bara at upplýsa, men eisini at varðveita sambandið, vísa tey bæði á.

Spurd, hvat tað merkir at vera "venskabsmenigheder", sum tey kalla tað, vísa tey á ymsar samskiftismøguleikar millum afrikansku og føroysku kirkjuna.

- Í føroysku fólkakirkjuni ætla vit at gera Tanzania til serligt bønarevni, og umframt bøn er ætlanin at eggja til samskifti gjøgnum teldupost og møguligar vitjanir landanna millum, sigur Torben Holm, samskiftisleiðari í Danmission. Við tað at talan er um rættiliga nýtt samband millum Tanzania og Føroyar á kirkjuliga økinum, er sambært bispi ógjørligt at siga, hvussu ítøkiliga samarbeiðið verður millum samkomurnar báðar í framtíðini.

### Vaksandi felagsskapur

Danmission er ein samanlegging av felagsskapunum Det Danske Missionsselskab og Dansk Santalmission, og fór samanleggingin fram 1. januar 2001. Hesir báðir eldru felagsskapirnir hava yvir 180 ára royndir við arbeiði í triðja heiminum, og við hesum drúgvu royndum verður Danmission allýstur sum ein fólkakirkjuligur trúboðara- og hjálparfelagsskapur, sum arbeiðir í tilsamans 15 londum í Asia, Afrika, Miðeystri og Europa.

- Í løtuni eru um 5000 danir frívilliga tengdir at Danmission, bæði sum stuðlandi í Danmark og úti á markini í triðja heiminum. Umframt hesi 5000 eru 28 danir og 40 útlendingar í føstum starvi í Danmission settir av fólkakirkjuni, m.a. eg og Torben, sigur landsskrivarin Ruth-Inge Gregersen. Danmission er sambært føroyvitjandi umboðunum ein vaksandi felagsskapur, bæði fíggarliga og víðvíkjandi virknum limum.

- Seinasta ár høvdu vit eina inntøku á 33 milliónir danskar krónur, og fer allur peningurin til virkið okkara í triðja heiminum, sigur Torben Holm. Allar inntøkurnar eru gjøgnum frívilligar gávur, "genbrugshandlar" umframt onnur innsavnandi tiltøk.

Sambært teimum báðum starvsfólkunum í Danmission eru aðalendamál felagsskapsins býtt í seks ymiskar orðingar við atliti til triðja heimin: Heilsa og umsorgan, kirkjumenning, landbúnaðarráðgeving, integratión av nýdanskarum í Danmark, útbúgving av kvinnum og børnum og til seinast at fáa samskifti í lag millum ymisk lond og ymsar átrúnaðarligar uppfatanir.

### Lokalu kirkjurnar taka stig

Ruth-Inge Gregersen leggur dent á, at Danmission ikki fer inn í nýggj øki við endamálinum at broyta og kollvelta mentan og lívshættir teirra.

- Vit vera altíð boðin av lokalu kirkjunum á staðnum, og eftir at tey hava vent sær til Danmission við fyrispurningi um hjálp, gerst felagsskapurin virkin í økinum, har stórur dentur verður lagdur á tillaging og integratión, vísir landsskrivarin á.

Sambært teimum hjálpir Danmission upprunafólkinum við tí, tey biðja um og hava brúk fyri, og á henda hátt er eitt aðalendamál at styrkja lokalu fólkakirkjurnar í triðja heiminum, har upprunamentanin verður varðveitt og ynskini hjá upprunafólkunum gingin á møti.

### Niðurbróta fordómar

Sum nevnt í einum av seks endamálum felagsskapsins ynskir Danmission at fáa samskifti og samarbeiði í lag millum ymisk lond, ymsar útrúnaðir og ymsar mentanir.

- Vit síggja dagliga aggressivar og fíggindasinnaðar muslimar í sjónvarpinum, vit standa andlit til andlits við annað mál og aðra mentan í fulla bussinum í Keypmannahavn, vit síggja klædnafjaldar kvinnur á gøtunum, og gjøgnum fjølmiðlarnar verða vit bombarderaði við fíggindasinnaðari fremmandagerðing, serliga millum Kristindómin og Islam, vísa donsku gestirnir úr Danmission á.

Við støði í hesum ynskir felagsskapurin at byggja brýr millum átrúnaðarligu bólkarnar bæði í Danmark og úti í heimi, har endamálið er friður, dialogur og forstáilsi millum ymsu religiónirnar, har fordómar og fremmandagerðing verður niðurbrotið.

Tey bæði Ruth-Inge Gregersen og Torben Holm fóru av landinum fríggjadagin, og vóna tey, at samskifti millum fólkakirkjuna í Føroyum og Tanzania kann mennast og halda fram.



**Arbeitt verður við at stovna fiskamóttøku og uppboðssølu á Eiði. Eitt samtak av útróðrarmonnum og øðrum hevur gjørt avtalu við Eiðis Kommunu um at keypa móttøkuhøllina, sum kommuna hevur bygt á havnarlagnum, fyri 900.000,- krónur**



*Arbeitt verður við ætlanum um at stovna fiskmóttøku og uppboðssølu, sum skal halda til í móttøkuhllini, sum Eiðis Kommuna í síni tíð lat byggja á havnarlagnum á Eiði*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Arbeiða við uppboðssølu á Eiði

FISKAMÓTTØKA
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Arbeitt verður við at seta enn eina fiskamóttøku og uppboðssølu á stovn. Hesaferð á Eiði. Samráðingar hava verið millum Eiðis Kommunu og fólk, sum vilja keypa móttøkuhúsið hjá kommununi á havnarlagnum.

Útróðrarmenn og onnur áhugað, hava tikið stig til at keypa móttøkuhøllina, sum Eiðis Kommuna fyri nøkrum árum síðan reisti á havnarlagnum á Eiði, til móttøku og uppboðssølu. Tey arbeiða við at stovna felag til endamálið. Samráðingar hava verið við Eiðis Kommunu um keyp av høllini, og keypið komið so nær, at bara undirskrivingin manglar.

Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði, váttar, at samráðingar hava verið, og at prinsippavgerð er tikin um at selja. Prísin vil hann ikki gera nakrar viðmerkingar til yvirhøvur. Men kommunan hevur góðtikið tað boðið, sum komið er, og tað hava teir, sum eiga boðið, fingið at vita. Nú manglar bara tað formella í samband við sjálvan handilin.

Ein teirra, ið er við í samtakinum, váttar, at teir hava boðið 900.000,- krónur fyri høllina,og at Eiðis Kommuna hevur tikið av hesum tilboðnum.

Talan er um ein breiðan skara av fólki, sum er við í samtakinum, ið vil keypa høllina. Tað er fólk bæði av Eiði og aðrastaðni frá. Talan er um seks útróðrarbátar, eina sølufyritøku og eina flutnignsfyritøku, sum bæði skal taka sær av at landa og at flyta fiskin til keyparan.

Tordur Niclasen, borgarstjóri, sigur, at tað frøir hann, at tað nú sær út til, at lív kemur í høllina, sum hevur staðið tóm á havnarlagnum á Eiði í nøkur ár.

Tað krevur nakað væl enn, áðrenn høllin kan nýtast til fiskamóttøku og uppboðssølu. Talan er bara um sjálva beinagrindina, sum upp er komin enn. Eitt rómt, innilokað rúm. Øll innrætting skal gerast frá grundini av, áðrenn húsið kann brúkast til ætlaða endamálið.

Tað skilst, at teir, sum ætla undir hetta tiltakið á Eiði, arbeiða fram í móti at vera klárir, tá várróðurin byrjar aftur.

# Góðskan á útróðrarfiskinum skal hækka

**Nýggj uppboðssøla skal geva betri prís. Men tað krevur eisini, at fiskurin veður tann allarbesti, sum kemur á marknaðin, sigur reiðari á útróðrarbáti**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Endamálið við at stovna móttøku og uppboðssølu á Eiði, er at fáa betri prís til bátarnar, sum landa har. Men tað er eisini ein treyt fyri betri prísi, at fiskurin, sum landaður verður, er í fínasta standi.

Ein teirra, sum stendur aftan fyri samtøkuna, ið ætlar at fara undir móttøku og uppboðssølu á Eiði, er Asbjørn Djurhuus, sum er reiðari á útróðrarbátinum Norðsøka, ið rør út av Eiði.

Hann sigur, at teir eru farnir undir hetta, tí teir hava ikki altíð hildið seg faa nóg góðan prís fyri fiskin, sum seldur verður á Toftum. Og tað kunnu vera ymsar orsøkir til tað, heldur hann. Eitt nú tann nógva umskipanin g flutningurin, sum er, tá fiskur skal handfarast ofta.

Nú er ætlanin at flyta søluna fleiri lið nærri rulluni, sum hann tekur til.

Men tað er ikki nokk bara at koma nærri bátinum ið søluliðnum. Skal fiskurin vera fyrstafloks, skal viðgerðin byrja longu við rulluna. Tað krevur nógv, og tað skal so aftur geva úrtøku í hinum endnaum, vísir hann á.

Tað verður ofta skotið útróðrarmonum í skógvarnar, at útróðrarfiskurin er tann ringasti, ið kemur á marknaðin, hóast hann er feskastur. Men av tí, at hann er ov illa hagreiddur umborð, stendur hann ikki mát við tað, hann eigur. Og í ávísum førum er tað vist eisini rætt, ásannar Asbjørn Djurhuus. Tað allarfyrsta at gera er, at sleppast má undan hesum einsamalla manninum, sum rør út við línu, heldur hann.

– Eg trúgvi ikki rættiliga upp á hann, at hann kann klára at hagreiða fiskin ordiliga. Hann skal bæði stýra upp, standa við rulluna, blóðga og kryvja alt í senn. Leggja fiskin í ís og alt hitt, sum gerast skal. Tað ber heilt einfalt ikki til hjá einum einsamøllum manni.

Bátarnir skulu hava duppult sett av kørum, sigur Asbjørn Djurhuus. Soleiðis slepst undan, at fiskurin verður stoyttur meira enn ta einu ferðina. Eitt sett fer á marknaðin, og tað næsta kemur umborð.

– Sjálvir hava vit fingið okkum nýggja útgerð til at lata ísvatn í, greiðir hann frá. Tað verður latið umborð í dag, og vit eru sera spentir upp á at síggja, hvussu tað fer at rigga. Gomlu dekskørini verða nú koyrd í land. Tað skal so gera, at fiskurin verður enn minni hagreiddur og tað betri fyri, tá hann kemur til keyparan.




*Útróðrarmenn mugu koma burtur frá at handfara fiskin so ofta, sum gjørt hevur verið. Fiskurin skal ikki nertast frá tí, hann er kruvdur, til hann fer á borðið inni á virkinum, sigur Asbjørn Djurhuus, reiðari á Norðsøka, sum her landar upsa undan Íslandi upp á gamlan máta*

*Mynd: Edvard Joensen*